LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

**Løgtingið**

**Svar**
**uppá**

**skrivligan fyrispurning nr. 100/2020 eftir tingskipanini § 52a til Bárð á Steig Nielsen, løgmann, frá Høgna Hoydal, løgtingsmanni, um lýsingaherferð fyri at fáa føroyingar at brúka danska NemID heldur enn føroyska talgilda samleikan**

**Fyrispurningurin var soljóðandi:**

1. Hevur Føroya løgmaður góðkent, at Føroya fólk verður eggjað til og vegleitt til at fáa sær ta donsku NemID-skipanina?
2. Hevur Føroya løgmaður ta støðu, at føroyska fólkið skal velja sær tað danska NemID, heldur enn føroyska Samleikan, (tann talgildi samleikin) sum Løgtingið hevur samtykt og játtað pening til?
3. Hvørja avleiðing kann tað fáa fyri menningina av føroyska Samleikanum, (tann talgildi samleikin) um Føroya fólk velur at brúka tað danska NemID?
4. Hvussu nógv hava føroyskir peningastovnar, føroyska samfelagið og vanligir føroyingar fingið í inntøku av, at tað danska NETS, ið eisini umsitur øll gjaldkort og gjaldingar hjá føroyska fólkinum, nú er selt til eitt amerikanskt felag fyri meira enn 20 milliardir krónur?

**Svar:**

**Til 1:**
Tað áleggur ikki løgmansembætinum at góðkenna møguligar lýsingar, sum greiða frá møguleikanum at fáa tillutað cpr. nummar og NemID.

**Til 2:**

Tað er rættiliga týdningarmikið ikki blanda talgilda samleikan og NemID saman.

Talgildi samleikin verður nýttur í innanhýsis viðurskiftum í Føroyum. NemID verður brúkt av føroyingum í teirra samskifti við skipanir uttan fyri landoddarnar. Skipanirnar kappast ikki við hvørja aðra, men eru til hvør sína nýtslu. Tað stendur eisini øllum frítt at velja sær talgilda samleikan ella NemID alt eftir, um tey skulu hava samband við skipanir innanfyri ella uttanfyri landoddarnar.

Ríkisumboðið veit at siga, at tey hvønn dag eru í samskifti við borgarar, sum spyrja um møguleikan at fáa cpr. nummar og NemID. Frá 1.januar 2021 til 11.mars 2021 hevur Ríkisumboðið fingið 270 umbønir um at fáa cpr. nummar. Frá 22.februar 2021 til 11.mars 2011 hevur Ríkisumboðið fingið 102 umbønir um at fáa NemID.

Tinganes · FO-100 Tórshavn · Faroe Islands
Tel. +298 306000 · lms@lms.fo · www.lms.fo

Hetta er eitt greitt tekin um, at tað hevur verið ein tørvur í Føroyum at hava møguleikan at fáa cpr. nummar og NemID. Við nýggju møguleikunum er tað blivið nógv smidligari hjá føroyingum at samskifta og at fáa atgongd til danskar almennar – og privatar stovnar

Ein sertrupulleiki hevur verið, at peningastovnarnir hava verið noyddir at brúka NemID innanhýsis í Føroyum, tí at talgildi samleikin ikki lýkur tey krøv, sum lóggávan setur. Eg skilji, at arbeitt verður við hesum og at peningastovnarnir um ikki so langa tíð kunnu bjóða føroyingum at logga á sínar skipanir við talgilda samleikanum.

**Til 3:**
Eg havi onga orsøk til at halda, at talgildi samleikin ikki fer at verða nógv brúktur í Føroyum. Eg síggi ikki stórvegis vanda í, at tey, sum hava tørv á einari smidligari skipan uttan fyri landoddarnar, eisini brúka NemID.

**Til 4:**
Tær fyritøkur og teir einstaklingar ið áttu partabrøv í NETS, tá ið sølan fór fram, fáa tann partin av søluupphæddini, tey hava rætt til. Hetta er sjálvandi eisini galdandi fyri møguligar føroyskar partabrævaeigarar, eisini peningastovnar og "vanligar føroyingar", um tey hava átt partabrøv. Eru partabrøvini seld við vinningi, skal kapitalvinningsskattur rindast av hesum. Hvussu nógvir føroyingar áttu NETS-partabrøv og hvørjir hesir vóru, veit eg ikki.

Í Tinganesi, 23. mars 2021

Bárður á Steig Nielsen
løgmaður